# Ferðavinnusamskipari í Suðuroy



Endurlýsing

LÝSING

Í sambandi við, at kommunurnar í Suðuroy eru vorðnar samdar um at ganga saman um at menna ferðavinnuna í oynni, verður søkt eftir ferðavinnusamskipara til Suðuroyar Ferðavinnufelag.

Kommunurnar eru samdar um, at verkætlanin "Suðuroyar Ferðavinnufelag" skal ganga yvir 3 ár. Verkætlanin skal javnan eftirmetast. Endamálið er at fáa fleiri ferðafólk til Suðuroyar, føroyingar sum útlendingar, og geva teimum bestu upplivingarnar.

Ferðavinnusamskiparin kemur at virka í neyvum samstarvi við kunningarstovurnar í oynni – í løtuni á Tvøroyri og í Vági – og verða hansara arbeiðsuppgávur m.a. at virka fyri:

- **AT** menna og økja um ferðamøguleikar og vera íbirtari til fleiri tilboð í oynni
- **AT** tryggja hægstu góðsku á ferðavinnuøkinum í oynni
- **AT** samskipa ferðavinnuátøk
- **AT** samskipa marknaðarføring av ferðavinnutiltøkunum
- **AT** veita kunning og dygdartænastu til ferðafólk / m.a. við heimasíðuni
- **AT** samstarva við ferðavinnuveitarar, kommunur og aðrar myndugleikar
- **AT** finna ymiskar fíggingarmøguleikar til frama fyri ferðavinnuna í oynni

**Førleikakrøv**
Útbúgving innan ferðavinnu, sølu og/ella marknaðarføring ella aðra viðkomandi útbúgving/royndir
Teldukunnleika
Munnligan og skrivligan førleika til føroyskt, enskt og skandinaviskt.
Góð íverksetara-, samskipanar- og samstarvsevni

**Starvs- og lønarviðurskifti**
Samskiparin verður settur við 12 mð. royndartíð og síðani fyri restina av 3-ára skeiðnum. Starvið verður lønt sambært avtalu við ferðavinnunevndina.

**Nærri upplýsingar**
Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Elin Nielsen, telefon 371719/216595.

**Umsóknir**
Sendið umsókn við avriti av prógvum o.ø. til Elin Nielsen 870, Fámjin.

**Freist at søkja**
Umsóknarfreistin er týsdagin 22. juli 2008.

Ferðavinnan í Suðuroy

# Hevur tú eitt miðlafólk í búkinum?

Starvslýsing: Journalistur til Miðlahúsið




Samtakið kring Miðlahúsið fevnir um Sosialin og Miðlavarpið, ið rekur Rás2. Í samtakinum starvast í dag 42 fólk.

Kom og hjálp okkum at menna Rás2, Sosialin og Portalin. Í Miðlahúsinum í Vágsbotni vilja vit støðugt styrkja okkum til avbjóðingarnar í einum livandi fjølmiðlaheimi.

Síðani oktober í fjør hevur Rás2 verið partur av okkara samtaki, sum er í støðugari menning. Nú sóknast vit eftir fólki at styrkja um tíðinda- og aktualitets partin á redaktiónini, fyrst og fremst á Rás2.

Sum partur av Miðlahúsinum fær tú møguleikan at virka í einum livandi og dynamiskum fjølmiðlaumhvørvi, har vit í felag royna at gagnnýta styrkir og møguleikar hjá okkara miðlum. So hevur tú hug til tíðindaheimin? Nøs fyri eini góðari søgu? Hevur tú hug og evni, bæði at arbeiða sjálvstøðugt og tætt saman við øðrum. Og dámar tær avbjóðingar? So lat okkum frætta frá tær!

Útbúgving og/ella royndir innan fjølmiðlaøkið eru absolutt fyrimunir, men tó ikki treytir.

Tú byrjar í starvi hjá okkum skjótast tilber, men helst ikki seinni enn 1. august.

Tú frættir meira um starvið við at seta teg í samband við Jan Müller, stjóra, á telefon 341800. Eisini ber til at senda teldubræv til jan@sosialurin.fo

Merkið brævbjálvan »umsókn« og sendið hesa í seinasta lagi 15. juli til:

**P/F Miðlavarpið**
**Postsmoga 76**
**FO-110 Tórshavn**

Sosialurin
miðlahúsið í Vágsbotni